





vent tí brain-drainið, sum hevur verið seinastur árini, soleiðis at vit fáa okkara fólk við útbúgving og neyðugum førleikum heimaftur, ella í hvussu so er at verða partur av føroyska samfelagnum. Eisini kann hetta styrkja hugin hjá útlendingum at gera íløgur í og at virka í Føroyum, og harvið fáa til vega bæði váðafúsan kapital og vitan.

## Táta

Ansast skal tó eftir, at hetta ikki gerst ein táta, sum politiska skipanin brúkar til at vísa framburð við og ikki ger sítt arbeiði á øðrum økjum, t.d. við at aðrar ætlanir steðga og at vit hugsa hetta inn í m.a ferðslunet, bústaðarpolitik, mentunarpolitikk og arbeiðsmarknað. Stóratjørn er eitt privat átak, sum lyftir føroyska ambitiónsstøðið almikið, og tí er alneyðugt at politiska skipanina torir og klárar at fylgja við.

## Váði?

Váði er sjálvsagt eisin bundin at slíkari ætlan. Talan er um eina vinnuliga verkætlan, sum íleggjararnir skulu vinna pening burtur úr. Tí skal tað eisini bera seg. Skuldi tað hent, at verkætlanin steðgaði mitt í arbeiðnum ella ikki ber seg, fær tað eisini fylgjur, tí nógvur kapitalur fer burtur eins og tað kann seta váðafýsni longur aftur enn í dag. Men Føroyar hava tørv á, at slíkar ætlanir verða gjørdar, at tær verða uppgraderaðar, og at tær fáa dynamikk frá einum av okkara egnu. Fyrsta stigið er sjálsagt at vita, um Tórshavnar Kommuna gevur neyðugu loyvini, og annars so er bara at fara til arbeiðis beinanvegin. Møguliga er tað so at verkætlanin kann betrast, neyvan fæst full semja um hvussu ein slík ætlan er best. Eisini er rætt at umhugsa um bygging á henda hátt elvir til ghettoir. Eg loyvi mær at ivast, tí okkara samfelagsskipan er nógv ørvísi enn í Grønlandi og Danmark, talan er ikki um so nógvar íbúðir í blokkum, nevniliga 100 og nýggj húsabygging er við síðuna av Stórutjórn.

## Menning er broyting

Alheimsgerð og samfelagsmenning snýr seg um at fylgja við tíðini, tillaga og betra seg, men eisini um at styrkja seg og finna serlig sterk økir. Tí er tað ein tilgongd, har neyðugt er at hyggja út handan hav, men eisini at hyggja inn eftir sær sjálvum. Neyðugt er at halda fast í sær sjálvum, men ikki so fast, at broyting og menning ikki ber til. Vit skulu ikki blaka føroyska mentan og virðir fyri borð, men brúka tey til at innrætta okkum eftir við teim nýggju avbjóðingunum sum eru. Stóratjørn skapar eitt meira altjóða umhvørvið til bæði arbeiði og frítið. Hetta kann verða ein kickstartari, sum ger Føroyar áhugaverdari hjá bæði útisetum og útlendingum. Stóratjørn gevur asfaltføroyingum fleiri tilboð og lyftir privata initiativið uppá at kappast við grannalondini í umstøðum og tí eisini vinnuumhvørvi.